# Býráðið

**Dagfesting:** 03.07.2023 kl. 00:00
**Málnr.:** 22/00084

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, David Andreasen, Edva Jacobsen, Eivin Breiðaskarð, Gudny Vang, Ólavur Larsen

Varalimir: Bergtóra Cederiusdóttir fyri Sonni á Horni, Kristian Martin Petersen fyri Magni Jøkladal

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 27/23 | 23/00246-8 | Innkalling av Kristian Martin Petersen, sum varalim fyri Magna Jøkladal á býráðsfund 3. juli 2023 |
| 28/23 | 23/00246-9 | Innkalling av Bergtóru Cederiusdóttir, sum varalim fyri Sonna á Horni, til býráðsfundin 3. juli 2023 |
| 29/23 | 23/00325-1 | Eykajáttan til Heilsumiðstøð |
| **Til kunning** | | |
| | | |

**Til støðutakan**

## 27/23
## 23/00246-8 Innkalling av Kristian Martin Petersen, sum varalim fyri Magna Jøkladal á býráðsfund 3. juli 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 03.07.2023 | 27/23 |

### Tilráðing

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
| Stutt lýsing av málinum | Magni Jøkladal, býráðslimur, hevur forfall til býráðsfundin 3. juli 2023 kl. 17:00. Eftir ynski frá Magna Jøkladal er Kristian Martin Petersen kallaður inn til býráðsfundin sambært § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini.<br><br>Kristian Martin Petersen er fjórðvaldi limurin á lista B við 46 atkvøðum í sambandi við kommunuvalið 10. november 2020.<br><br>Býráðið skal – samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini – fyrst á fundinum 3. juli 2023 gera av, um treytirnar fyri innkallan av tiltaksliminum Kristian Martin Petersen eru loknar samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Magni Jøkladal, býráðslimur hevur forfall til býráðsfundin 03. juli 2023 kl. 17:00. | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Kommunustýrislógin, kapittul 3.<br>• **Møgulig fylgiskjøl** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Dávur Juul, borgarstjóri, mælir til, at Kristian Martin Petersen kann taka sætið í Fuglafjarðar býráð í sambandi við býráðsfundin 3. juli 2023 kl. 17:00 | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| Dagf | 01. juli 2023 |
| --- | --- |

**Býráðið 03. juli 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við at Kristian Martin Petersen tekur sæti sum varalimur fyri Magna Jøkladal á býráðsfundinum 3. juli 2023.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**28/23**
**23/00246-9 Innkalling av Bergtóru Cederiusdóttir, sum varalim fyri Sonna á Horni, til býráðsfundin 3. juli 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 03.07.2023 | 28/23 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Sonni á Horni, býráðslimur, hevur forfall til býráðsfundin 03. juli 2023 kl. 17:00. Eftir ynski frá Sonna á Horni skal varalimur kallast inn til býráðsfundin sambært § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini.<br><br>Fjórðvalda á lista Á Lillian Jacosen hevur boðað frá at hon metir seg vera ógegniga at luttaka á býráðsfundi 03. juli 2023, tí hon sum leiðari á teknisku deild stendur aftan fyri málið sum er á skrá. Næst á lista Á er Bergtóra Cederiusdóttir.<br><br>Býráðið skal – samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini – fyrst á fundinum 03. juli 2023 gera av, um treytirnar fyri innkallan av tiltaksliminum Bergtóru Cederiusdóttir eru loknar samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Kommunustýrislógin<br>• **Møgulig fylgiskjøl** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Borgarstjórin mælir til, at Bergtóra Cederiusdóttir tekur sæti fyri Sonna á Horni í Fuglafjarðar býráð í sambandi við fundin 03. juli 2023. | | |
| Dagf | 01. juli 2023 | | |

4

**Býráðið 03. juli 2023:**

Býráðið tók einmælt undir við at Bergtóra Cederiusdóttir tekur sæti sum varalimur fyri Sonna á Horni á býráðsfundinum 3. juli 2023.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**29/23**
**23/00325-1 Eykajáttan til Heilsumiðstøð**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.06.2023 | 29/23 |
| 2 Býráðið | 19.06.2023 | 26/23 |
| 3 Fíggjarnevndin | 03.07.2023 | 31/23 |
| 4 Býráðið | 03.07.2023 | 29/23 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevnd og býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Umvælingin av fyrrverandi FK bygninginum til heilsumiðstøð (Rakstrarstað 615) er nú um at gerast liðug.<br>Ætlanin fyri 2023 var at fíggja bygging og innbúgv lutvíst av ikki- nýttari játtan í 2022 og lutvíst av nýggjari játtan í 2023.<br><br>Av tí at løguinntøkurnar sviku í 2022, var eingin játtan at framflyta til í 2023.<br><br>Talan er tí ikki um, at sjálv verkætlanin kostar meira enn væntað, men at tað netto ikki varð løgupeningur at flyta frá 2022 tí aðrar verkætlanir kostaðu meira og inntøkan av grundøkja sølu varð minnið enn væntað.<br><br>Tað restar upphædd til innbúgv í løgujáttanini fyri 2023. Tekniska deild hevur samráðst við veitara av innbúgvið um innkomna tilboðið og er eftir samráðing komin fram á kostnaðin:<br>Innbúgv: 1.573.064<br>Mvg: 98.316,50<br>Óvæntað: 100.000,-<br>Íalt kr. 1.771.380,50<br><br>Játtan er ikki til hetta í inniverandi fíggjarætlan. Um hetta skal íverksetast í heyst, er tískil neyðugt við eykajáttan til endamálið.<br><br>**Ískoyti til Fíggjarnevndarfund og Býráðsfund 3. juli 2023**<br>Á býráðsfundinum 19. juni 2023 bað býráðið um, at fáa eykajáttanina til Heilsumiðstøðina betur útgreinaða til aðru viðgerð. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

<table>
<tr><td></td><td>
Umsitingin hevur gjøgnumgingið grundarlagið undir eykajáttanarumbønini og staðfest, at orsaka av misskiljingum er umbønin ikki røtt.
Í 2021 samtykti býráðið at seta pening av til nýggja heilsumiðstøð. Mett var, at tað fór at kosta uml. 9 mió. kr. Avgerð bleiv tikin um at játta 4,5 mió. kr. um árið í 2022 og 2023.
Til fíggjarætlanina 2023 visti kommunan av, at øll játtanin fyri 2022 ikki varð nýtt og tí bleiv játtanin í 2023 hækkað við 1,3 mió. kr, sum metingin á heysti væntaði avlopið fór at vera í 2022. Harafturat vóru 1,2 mió. kr. settar av til innbúgv. Játtanin í 2023 bleiv tí 4,5 + 1,2 + 1,3 = 7,0 mió. kr.
Tá roknskapurin varð endaliga uppgjørdur vísti tað seg, at minninýtslan í 2022 var 1,935 mió kr. Tí mangla 635 tkr. í tí játtanin í 2023 bert varð hækkað við 1,3 mió. kr.
Tilboðið uppá innbúgv vísti seg, at verða 475 tkr. dýrari enn avsett er.
Afturat hesum er komið trappa og rekkverk heimanfyri bygningin, sum ikki varð við í upprunaliga verkætlanini, eins og ynski er um at fáa elektroniska lásaskipan við, sum heldur ikki varð við upprunaliga.
Eykajáttanarumbønin til aðru viðger er tí:
<table>
<tr><td>Minni nýtsla 2022</td><td>kr. 635.000</td></tr>
<tr><td>Meirkostnaður innbúgv</td><td>kr. 475.000</td></tr>
<tr><td>Trappa og rekkverk</td><td>kr. 75.000</td></tr>
<tr><td>Lásaskipan</td><td>kr. 300.000</td></tr>
<tr><td>Óvæntað til innbúgv</td><td>kr. 100.000</td></tr>
<tr><td>Tilsamans</td><td>kr. 1.585.000</td></tr>
</table>
</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td>Sambært kommunu stýrislógini §38 skal fíggjarnevndin ummæla uppskot til eykajáttan, sum skal leggjast fyri býráðið og sambært § 41 krevur eykajáttanin tvær góðkenningar frá kommunustýrinum við í minsta lagi 14 daga millumbilum.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td>
Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt<br>Kommunustýrislógin og Kommunustýrisskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu
Møgulig fylgiskjøl<br>Frágreiðing til 2. viðgerð um eykajáttan til Heilsumiðstøðin...
</td></tr>
</table>



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

<table>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>Ja</td><td>Nei</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>Nei</td><td>Nei</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Mælt verður til at Fíggjarnevndin tekur undir við at veita eina eykajáttan uppá 1.772 tkr. til at gera heilsumiðstøðina lidna og mæla býráðnum til at taka undir við hesum til fyrstu viðgerð mánadagin 19. juni 2023. Eykajáttanin verður fíggjað av innistandandi peningi.<br><br>Tilmæli til Fíggjarnevndarfundin 3. juli 2023<br>Mælt verður fíggjarnevndini til at taka undir við eykajáttanini uppá 1.585 tkr. og mæla býráðnum til, at góðkenna eykajáttanina við broyttari upphædd við aðru viðgerð. Eykajáttanin verður fíggjað av innistandandi peningi.</td></tr>
<tr><td>Dagf</td><td colspan="3">14. juni 2023<br>01. juli 2023</td></tr>
</table>



**Fíggjarnevndin 16. juni 2023:**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum um, at heilsumiðstøðin í 2023 fær eina eykajáttan uppá 1.772 tkr. og mælir býráðnum til, at samtykkja eykajáttanina við 1. viðgerð.

**Býráðið 19. juni 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við uppskotinum og ynskir at fáa betri útgreining av málinum til aðru viðgerð.

**Fíggjarnevndin 03. juli 2023:**
Fíggjarnevndin tekur undir við broytta eykajáttanaruppskotinum til heilsumiðstøðina og mælir býráðnum til at góðkenna hesa við aðru viðgerð.

**Býráðið 03. juli 2023:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini um, at góðkenna eykajáttanina uppá 1.585 tkr. til Heilsumiðstøðina við aðru viðgerð.

Fundurin lokin kl. 17.30

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

David Andreasen

Edva Jacobsen

Eivin Breiðaskarð

Gudny Vang

Ólavur Larsen

Bergtóra Cedriusdóttir

Kristian Martin Petersen